## Pensjonistar til Íslands

Landsfelag Pensjonista skipar saman við Atlantsflogi, Hótel Loftleiðum og Marentzu Poulsen fyri einari ferð til Reykjavíkar í døgunum frá 8. til 12. oktober. Talan er um eina pakkaferð, og kostnaðurin fyri hvønn er 4.935 krónur í dupultkamari og 5.895 krónur í einakamari. Marentza Poulsen, sum er ættað úr Skopun og býr í Reykjavík, verður ferðaleiðari. Ætlanin er millum annað at hava eitt hugnakvøld, og møguleiki er fyri útferðum.

## Til Danmarkar at arbeiða

Ongantíð hava so nógvir útlendingar leitað sær til Danmarkar at arbeiða sum nú. Tað eru serliga fólk úr teimum eysturevropeisku londunum og serstakliga póllendingar, sum velja at forvinna sær nakrar krónur í Danmark. Teir fyrstu seks mánaðarnar í ár fingu myndugleikarnir 17.000 umsóknir frá fólki um uppihalds- og arbeiðsloyvi, og tað er meiri enn alt áráið í fjør, skrivar Ritzau. Sambært Útlendingastýrinum eru tað fá, sum fáa noktandi svar.

# Vandamiklar Nokia-telefonir eisini í Føroyum

**Nokia er nú í ferð við at taka heili 46 milliónir battaríir við breki aftur. – Ivaleyst finnast nøkur battarí eisini í Føroyum, metir Rógvi Róin, sølu- og marknaðarleiðari hjá Kalli**

FARTELEFONIR

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Í gjár kunngjørdi Nokia, at brek er funnið á fleiri Nokia-battaríum av slagnum BL-5C, sum vandi er fyri kunnu gerast ov heit. Sambært framleiðaranum eru 100 tilburðir staðfestir. Tó eru eingir av tilburðunum álvarsamir. Kortini hevur Nokia bundið um heilan fingur og avgjørt at taka øll 46 milliónir battaríini, sum vórðu framleidd í 2005 og 2006, aftur og bjóðar ístaðin viðskiftafólkinum at endurveita battaríini ókeypis.

Hvørki Kall ella Føroya Tele fingið fráboðan frá fólki, ið eiga BL-5C-battaríið, ið er tað mest nýtta av sínum slagi.

### Finnast eisini í Føroyum

- Battaríini eru sera útbreidd, og ivaleyst finnast nøkur eisini í Føroyum, sigur Rógvi Róin, sølu- og marknaðarleiðari hjá Kalli.

Hildibjartur Hansen, innkeypsleiðari hjá Føroya Tele er samdur.

- Battaríini hava verið nógv seld. Men eg væntí ikki, at trupulleikin er so stórur, sum fleiri vilja gera tað til, sigur hann.

Hildibjartur Hansen sigur seg nevniliga ikki kenna til nakra fráboðan um far telefonir, ið eru vorðnar ov heitar.

Til tess at finna útav, um battaríið á Noka fartelefonini skal skiftast út, ber til at trýsta á slóðina http://www.nokia.com/battery-replacement/en/. Tá nummarið á battaríinum er upplýst, boðar heimasíðan frá, um neyðugt er at skifta battaríið ella ikki. Um so er, at tað skal skiftast, biður Nokia um persónligu upplýsingar hjá viðskiftafólkinum og sendir eitt nýtt battarí.



# Sebastian og føroyskir tónleikarar í Norðurlandahúsinum

**Hóskvøldið framføra danski trubadururin Sebastian, Hanus G. Johansen, Aldubáran, Benjamin Peteresen og United voices í Norðurlandahúsinum**

TÍÐINDASKRIV

Sebastian hevur í mong á glett danskarar í øllum aldri. Hann hevur síðan 1971 skrivað tónleik til m.a. filmar, sjónvarpsrøðir og sangleikir. Harumframt er Sebastian eisini ein framúr góður frásøgu maður.

Føroyingar hava eisini tikið væl ímóti Sebastian, hann var í Føroyum í mars 2006 og framførdi og tá sangleikinum Ronja Ránsmannadóttir, ið hann gjørdi tónleikin til, varð sýndur í Norðurlandahúsinum í novembur 2005.



### Forsmakkur í Norðurlandahúsinum

Fyri stóra arbeiðið sítt í mentanarlívinum innan tónleik og sang- og sjónleik fekk Sebastian herfyri riddarkrossin av Dannebrog.

Sebastian framførir á fáum festivalum í summar millum teir fáu eru Skanderborg Festivalurin og Dragør Festivalurin. Harafturímóti er hann í ferð við at leggja eina nýggja solokonsertferð í Danmark til rættis. Konsertirnar verða í oktober og november. Føroyingar fáa tí høvi at fáa ein "forsmakk" upp á, hvat Sebastian fer at borðreiða við á konsertini í Norðurlandahúsinum.

### Góð skoðsmál

Í sambandi við várkonsertferðina hevur Sebastian ikki fingið annað enn rós frá ummælarum í Danmark. Ferðin var sera væl eydnað og vísti ein sera væl upplagdan trubadur. Fólk hava reist seg upp, og lógvabrestir hava endurspeglað áhugan hjá áhoyrarunum runt um í landinum. Tey lokalu bløðini, sum hava umrøtt Sebastian, hava kastað rósur út til sangaran og frásøgumannin.

Leggjast kann afturat, at Sebastian í september verður við í Århus Festuge, har hann bjóðar fólki á konsert við føroyskum sangkrivarunum i Danmark, nevnliga Eivør, Høgni Lisberg og Maria Guttesen.

Uppliv Sebastian og Hanus G. Johannesen, Aldubáruna, Benjamin Petersen og United Voices í Norðurlandahúsinum 16. august kl. 20.00.

# Seinsummardagur í Sandavági

SUMMARTILTAK

*Tíðindaskriv*

Árliga summartiltakið, sum Sandavágs Ítróttarfelag vanliga skipar fyri í august mánað, er í ár flutt til tann 1. september. Hendan dagin er eisini ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin, so lagaligt er hjá fólki at koma aðrastaðni frá vestur í Vágar.

Nógv ymisk tiltøk eru á skránni.. Afturvendandi hevur seinnu árini verið eitt nú fjallarenningin niðan á Húsafelli, sum hevur fingið góða undirtøku, og hon verður sjálvandi eisini í ár.

Eitt annað sera skemtiligt tiltak, sum seinnu árini hevur verið við á degnum, er brandslangufótbólturin, har málmennirnir eru útgjørdir við hvør síni brandslangu og hava so loyvi at spula bæði bóltin so langt burtur frá egnum máli, sum gjørligt. Eisini er tað komið fyri, at bæði leikarar, dómari og áskoðarar hava fingið eina strálu.

Í ár verður skipað fyri fiskikapping. Tó ikki við báti, men við tráðu.

Skipað verður aftur í ár fyri væl umtókta sølutorginum, har fólk fáa borð at selja egnar vørur á.

Og so eru tað øll hini vanligu tiltøkini á og kring ítróttarøkið á Valloyruni, so sum burturluting av einum scootara, sigling í ánni, tónleikur, laksatorgið, fiskasuppan, grillin og mangt annað, sum fara at vara meginpartin av degnum.

Dagurin endar sum vant við hugnaløtu við felagssangi um kvøldið.

Endaliga skráin verður lýst ein av fyrstu døgunum.